# handVERKARIN

1. ÁRSFJÓRÐINGUR 2009 | BLAÐ NR. 29 | HAVNAR HANDVERKARAFELAG

## Nýtt:

# Handverksdepilin í Stoffalág



# Handverksdepilin í



## Handverksdepilin í Stoffalág 60

Havnar Handverkarafelag hevur seinastu 6 árini haft skrivstovu sína í bygninginum, sum felagið eigur í Sjúrðargøtu 20. Í vár flutti felagið úr Sjúrðargøtu inn í ognina, sum felagið eigur í Stoffalág 60. Og nú hava Havnar Handverkarfelag, Eftirlønargrunnurin, Landsfelag Handverkaranna og Føroya Prentarafelag gjørt avtalu um skrivstovusamstarv; soleiðis, at feløgini nú øll eru undir sama taki í Stoffalag 60. Bygningurin verður nevndur Handverksdepilin í Stoffalág 60.

## Innihald


| | |
|---|---|
| Formansfrágreiðingin 2009 | 4 |
| Eftirlønargrunnurin | 10 |
| Søgubrot um handverksvinnuna | 16 |
| Próvhandan á Tekniska Skúla | 20 |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag • Stoffalág 60 • Box 203 • 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl 9 til 15.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo

# Stoffalág 60



Annette Davidsen



Jonna Skaale

## Handverksdepilin

Feløgini hava felags skrivstovutíðir í Handverksdeplinum.
Avgreiðsla er mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Tlf. 35 48 00, Fax. 35 48 01
Teldupostur: handverk@handverk.fo

## Starvsfólk

Tey sum starvast í Handverksdeplinum eru: Eli Brimsvík formaður í Havnar Handverkarafelag, Petur Juul Jacobsen stjóri í Eftirlønargrunninum, Marita í Brekkunum skrivstovukvinna, Annette Davidsen skrivstovukvinna hjá Eftirlønargrunninum, og Jonna Skaale skrivstovukvinna, sum var sett í starv í sambandi við flytingina.

## Betri hølisumstøður

Ognin í Stoffalág 60 hevur seinastu árini verið leigað til Tórshavn kommunu.

Húsini eru í trimum hæddum; og her kunnu vit nevna, at niðasta hæddin nú er innrættað soleiðis, at gott pláss er t.d. til størri fundir, skeiðvirksemi og ymisk onnur tiltøk, sum feløgini skipa fyri.



Kjallarin verður gjørdur til fundar- og skeiðvirksemi.

Eli Brimsvík:

# Formansfrágreiðing 2009

**Aðalfundurin hjá Havnar Handverkarafelag, sum varð hildin 23. mars 2009 var nr. 59 í røðini, síðani felagið var stovna í 1950. Komandi ár eru sostatt 60 ár liðin síðani Havnar Handverkarafelag varð stovnað. Í tí sambandi er ætlanin at halda 60 ára føðingardagsveitslu fyri limum við maka.**

Farið er undir at fyrireika 60 ára føðingardag felagsins komandi ár. Enn er tó ikki tikin støða til , nær og hvar føðingardagurin verður hildin.

## Friðarligt á arbeiðsmarknaðinum

Í 2008 fekk felagið ikki nakra álvarsama fráboðan um sáttmálabrot. Okkum vitandi var 2008 – í so máta – eitt friðarligt ár við smáum trupulleikum. Men heilt uttan trupulleikar sluppu vit kortini ikki, tað vóru limir, sum boðaðu okkum frá nøkrum málum, sum vit so tóku upp og fingu loyst.

Talan var um vanlig ivamál, og nakrir lærlingatrupulleikar vóru eisini.

## Íslendingar

Sum øll vita var stór misnøgd við, at tað vóru íslendingar, sum fóru avstað við umvælingararbeiðinum á Landssjúkrahúsinum. Onkur metti, at teir undirbjóðaðu ella dumpaðu prísin í mun til føroyskar fyritøkur. Tað var eisini frammi, at teir allarhelst komu at gjalda íslendska handverkaraløn, sum er vorðin nógv lægri enn tann føroyska. Hetta hevur íslendska fyritøkan nú avsannað, og fyri stuttum varð kunngjørt, at íslendska fyritøkan hevur stovnað deild í Føroyum.

Vit eru tó vitandi um aðra íslendska fyritøku, sum fyri einum lítlum ári síðani rindaði íslendska sveinaløn í Føroyum.

Tá var ikki talan um niðurgangstíðir. Í hesum føri fóru vit inn í málið. Tað órættvísi fingu vit beint av vegnum.

## Niðurganstíðir

Annars eru sjálvandi nógvar uppsagnir í kjalarvørrinum av fíggjarkreppuni, sum nú rakar allan heimin. Vit meta, at tað hevur týdning, at felagið fylgir væl við gongdini, og fær trygd fyri, at allar uppsagnir eru eftir sáttmálanum og, at limirnir fáa tað, sum teir hava rætt til. Hetta hevur í ávísum føri verið ein trupulleiki, sum vit kortini hava fingið loyst.

Hetta eru ikki hugalig mál, men vit noyðast at síggja veruleikan í eyguni, at soleiðis er. Vit liva kortini í teirri vón, at gongdin skjótt vendur, soleiðis at gerandisdagurin verður meira hugaligur hjá øllum.

## Handverksdepilin

Fyrst í januar í ár fluttu Havnar Handverkarafelag og Eftirlønargrunnurin úr húsum felagsins í Sjúrðargøtu inn í húsini, sum felagið eigur í Stoffalág 60. Hetta var neyðugt; tað var vorðið ov trongligt í Sjúrðargøtu. Og vit mugu sanna, at arbeiðsumstøðurnar hjá felagnum og Eftirlønargrunninum eru vorðnar munandi betri.

Her eiga vit eisini at nevna, at samstarvsavtala er gjørd við Føroya Prentarafelag og Landsfelag Handverkaranna, so nú húsast vit



undir somu lon. Vit hava eisini lagt til merkis, at tað koma fleiri fólk á gátt nú, og er tað hugaligt.

Handverkarar eru í gongd við at innrætta kjallaran soleiðis, at vit kunna hava ymisk tiltøk og skeið fyri limunum.

Fyrispurningar hava verið frá onkrum stovni um at halda skeið har, m.a. fyri handverkarum, so tað síggja vit fram til.

## Ogn felagsins í Sjúrðargøtu

Í løtuni eru handverkarar í gongd við at umvæla hús felagsins í Sjúrðargøtu. Í hesum sambandi eru tveir møguleikar; at útleiga húsini ella at selja.

Í fyrsta umfari er ætlanin at leiga út. Onkur hevur víst áhuga fyri leigumáli, men eingin støða er enn tikin. Neyvan er rætta løtan at selja í, men fáa vit eitt rímiligt boð, so fara vit sjálvandi at umhugsa støðuna.

## Føroya Handverkarafelag

Fyri at fáa øll handverkarafeløgini samlaði aftur, hava vit – saman við Landsfelag Handverkaranna – havt fund við Føroya Handverkarafelag. Spennandi verður at frætta aftur um hetta frá Føroya Handverkarafelag.

## Fíggjarkreppan

Sum øll vita hevur verið rættuligt ódnarveður á peningamarknaðinum um allan heim.

Hetta hevur verið so mikið álvarsamt, at øll, sum eiga nakað av peningi eru rakt so ella so.





Havnar Handverkarafelag er tí heldur ikki sloppið heilt snikkaleyst. Vit mugu rokna við einum ávísum kurstapi, men vert er at leggja sær í geyma, at enn er onki tap staðfest.

Greinarar, sum vit hava tosað við, meta, at vit eru sera væl sloppin. Í hesum føri mugu vit sanna, at tað er vandi í allari vælferð.

Á sumri 2008 seldi felagið nøkur av partabrøvunum í Atlantic Petrolium til kurs u.l. 1.700,-

Eftir tað er virðið av hesum partabrøvum nógv fallið. Men vit hava vón um, at virðið aftur verður uppgangandi.

## Tekniski Skúli og lærlingar

Nú sær - langt um leingi - út til at gongd kemur á byggingina av Miðnámsdeplinum í Marknagil, og sigast má, at hetta hevur verið ein tungur og drúgvur róður. Nú mugu vit bara hava vón um at byggiætlanin fer at halda hesi ferð.

Eitt, sum vit hava lagt okkum eftir er, at kunna allar lærlingar um Havnar Handverkarafelag og Eftirlønargrunnin.

Her hava vit lagt dent á at kunna lærlingarnar um tey rættindi, sum lærlingar hava, og hvussu støðan er tá ein er vorðin sveinur.

Vit hava eftir ynski frá lærarum, sum undirvísa í Tekniska Skúla, verið einar 3 ferðir á skúlanum og kunnað um sáttmálaviðurskifti og ymiskt annað, sum hevur týdning fyri lærlingar.

Tað kemur eisini fyri, at lærlingar støkka inn á gólvið hjá okkum, tá okkurt ivamál hevur stungið seg upp. Vit eru fegin um, at vit eisini kunnu veita okkara komandi sveinum vegleiðing og hjálp.

Her mugu vit nevna, at tað kann undra, at lærlingar ofta vita sera lítið um teirra rættindi, og fyri ein part eisini skyldir. So her er heilt greitt ein tørvur.

Ein annar trupulleiki er, at fleiri meistarar als ikki eru limir í Meistarafelagnum, og eru tí ikki vitandi um nógv av teimun rættindum, sum lærlingar hava. Her kunnu vit nevna eftirlønina.

Men her er ongin umbering góð nokk, ein meistari, sum tekur ein lærling í læru, hevur skyldu til at seta seg inn í slík viðurskiftini.

## Pólendingar

Nú kreppan eisini rakti føroyska marknaðin, vóru onkur virkir noydd at siga fólki upp, vegna vantandi arbeiði. Heldur ikki Skipasmiðjan slapp undan. Einir 10 pólendingar vóru imillum tey, sum vórðu uppsøgd. Hettar



eru menn, sum hava starvast har í upp til eini 15 ár. Teir hava verið undir fullari skattaskildu, og hava tí eisini goldið ALS-gjald, og øll onnur gjøld, sum eru tengd at arbeiðsmarknaðinum. Men hesir menn kundu einki fáa frá ALS, av tí at teir bert høvdu arbeiðsloyvi til ein arbeiðsgevara.

Sagt varð, at teir t.d. ikki vóru tøkir á arbeiðsmarknaðinum.

Hetta er so langt úti, at ein ikki hevur orð fyri, hvussu vánalig henda undanførslan var. Vit hava roynt at ávirka har, sum vit kunna



hesum viðvíkjandi og kraft, at annaðhvørt fáa hesir menn aftur allan tann pening teir hava goldið til ALS, ella fáa teir útgjald, sum øll onnur her í samfelagnum.

Vit meta, at alt annað er ósømuligt fyri okkum føroyingar.

Annars er arbeiði í gongd við at gera broytingar í reglugerðini fyri ALS. Eitt av uppskotinum er at hækka útgjaldið frá 70% av eini arbeiðaraløn til at verða 80% av núverðandi løn, tó í mesta lagi 20.000,- kr. um mánaðin.

Ætlanin er eisini at stytta tíðina har ein kann verða í skipani.

Ein onnur broyting, er frammi um at strika karantenuna, sum er galdandi. Tað sum nú er galdandi er, at ein, sum verður uppsagdur, og hevur havt eina góða inntøku seinastu 6 mánaðirnar far eina karantenu, sum er 10 dagar, sum eina eyka straff fyri at hann hevur verið raskur at arbeiða.

## Limagjald/lívstrygging

Lat meg fyrst nevna, at vit hava havt fundir við onnur feløg, sum ynskja at koma upp í okkara lívstryggingar- og eftirlønarskipan.

Sigast má, at tey vóru sera ághugaði, men

enn er einki endaligt hesum viðvíkjandi. Arbeitt verður víðari við málinum.

Lívstryggingin hevur nú virka í síðani juni 2005. Og vit mugu siga, at hon hevur roynst okkum væl.



## Limagjaldið

Eitt sum vit eisini noyðast at taka støðu til er, um vit skulla broyta limagjaldið til % gjald, í staðin fyri – sum nú – fast mánaðargjald.

Ein fyrimunur við % gjaldi av lønini er, at eftirstøðan av limagjaldi verður minimerað.

Vit mugu ásanna, at vit brúka alt og nógva orku til at rykkja eftir útistandandi limagjaldi, og kortini fáa vit ikki alt inn.

Verður limagjaldið sett til % gjald, so er tað arbeiðsgevarin, sum skal flyta peningin, og soleiðis sleppur hvør einstakur frá at hugsa um limagjaldið.

Sum støðan hevur verið, hevur umleið helvtin av limunum gjørt fasta flyting til limagjaldi, og vit brúka alt ov nógva tíð til hina helvtina. Og so kunnu vit leggja afturat, at helst eru vit einasta fakfelagið í Føroyum, sum enn hevur fast limagjald.









SPEKT løggildir grannskoðarar Spf.
spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn
Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35

SPEKT løggildir grannskoðarar

# Eftirlønargrunnurin:
# Ársfrágreiðing 2009

**Sofus Joensen, formaður: Mær rennur í huga, nú eg skal greiða tykkum frá virkseminum hjá Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags fyri 2008, at eg byrjaði frágreiðingina fyri 2007 við at siga, at tað hevði verið eitt serstakliga baldrut ár.**



Tað hevði eg nokk ikki sagt, hevði eg haft minstu hóming av, hvussu árið 2008 fór at taka seg upp. Tí var 2007 eitt baldrut ár, so havi eg ikki orð fyri tí, sum 2008 hevur haft at bjóða okkum.

Bankar eru farnir á húsagang og hava klárað seg við antin at leggja saman, ella stjórnirnar í teimum ymisku londunum hava sprænt hópin av peningi inn í bankar og aðrar lánistovnar.

Hetta kenna vit best frá okkum sjálvum, har stjórnin í Danmark hevur gjørt bæði ein bankapakka 1 og so sanniliga eisini ein bankapakka 2 og onnur tiltøk.

Tryggingar og pensjónsgrunnar hava mist hópin av peningi, so alt í alt hevur tað verið eitt rættuligt fíggjarligt ódnarveður, sum vit fóru ígjøgnum í 2008.

## Íløguráðgevi

Og sum ein danskur íløguráðgevi segði í eini sending, sum var send á DR1, at alt stavar stutt



sagt frá, at vit ongantíð fáa nokk, og fólk, sum umsita pening hjá okkum og gera íløgur, taka størri og størri váða upp á seg, og tað er fyri at kunna vísa eitt størri og størri avkast til sínar kundar.

Tað hevur millum annað ført við sær, at eisini danskir bankar mistu milliardir í 2008.

## Bankar í fríum falli

Virðið á bankunum hevur í hesum tíðarskeiði verið mestsum í fríum falli. Vit kunnu til dømis hyggja at Eik Banka og partvís Føroya Banka. Eftirlønargrunnar kring okkum hava eisini mist milliardir av krónum, og limir í hesum grunnum hava mist størri ella minni part av síni eftirløn. Ikki minst í Íslandi, har hava vanlig fólk mist heilt upp til 60% av síni eftirløn.

## Vit eru varin

Nevndin í Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags hevur altíð haft fyri eyga at vera sera varin við íløgunum, tí sum ein serfrøðingur á økinum segði, at jú størri váða tú tekur upp á teg – jú størri er vinningurin, men tað kann líka so væl ganga hinvegin, at tú kann missa at kalla alt.

Og lat meg so beinanvegin viðganga, at vit heldur ikki eru farnir eftir tí heilt stóra vinninginum hesi árini, tó so, vit hava hvørt ár haft eitt fitt avlop, sum vit hava styrkt grunnin við. Nevndin í eftirlønargrunninum hevur spælt varisliga.

Og sum áður nevnt, meta serfrøðingar, at tað er grammheit, ið er orsøkin til, at vit í dag hava hesa kreppuna. Ikki bert her hjá okkum, men um allan heim.

Tað er millum annað tí, at tá vit gera íløgur og serliga í eftirlønargrunninum, kunnu vit ikki altíð gera tær íløgur, sum síggja út til at kasta mest av sær, ella sum eru mest lovandi í løtuni.

Vit mugu vera sera varin, tí tað eru ikki vit í felagnum, sum eiga peningin í grunninum, men hvør einstakur av tykkum saman við okkum. Og tað, sum vit altíð mugu hava fyri eyga, er hetta, at peningurin, sum stendur í Eftirlønargrunninum, er peningur, ið vit hava samlað saman – tað vit skulu liva av – tá vit eru blivin gomul.

## Tryggingareftirlitið

Og so enn ein sera týðandi forðing fyri, at vit ella onnur, sum taka okkum av fíggjarfænum, sum Eftirlønargrunnurin hevur í varðveitslu

fyri okkum øll, um man so má siga, er hon, at Tryggingareftirlitið, sum fyrr var á vitjan einaferð um árið, nú hevur eftirlit hvønn ársfjórðing.

Kannað og staðfest verður, um Eftirlønargrunnurin hjá okkum, til eina og hvørja tíð kann gjalda hvørjum sítt. Tað er nokk ein avleiðing av fíggjarkreppuni – og tað er bara gott at eftirlitið er hert.

## Starvsfólk

Men so má man minnast til, at tað setir størri krøv til okkara umsiting, sum frammanundan ikki er stór.

Tað at vit hava eina lítla umsiting ger, at tað ikki er so dýrt at umsita peningin í okkara grunni, sum t.d. at umsita Lív fyri ikki at tala um nógvar danskar grunnar. Og her má sigast, at tey, sum starvast á skrivstovuni hjá okkum, og sum dagliga gera arbeiðið við at skráseta limir, sundurgreina eftirlønargjøld, kanna at



arbeiðsgevarin flytur tað, ið hann skal, svara telefonum og nógv annað. Hesi fólk gera eitt stórt og týdningarmikið arbeiði. Eg vil takka teimum, og fara so langt sum at siga, at uttan teirra ágrýtni, var ongin eftirlønargrunnur.

Og so er tað sjálvandi eisini grannskoðari okkara, sum verður spurdur til ráðs, um so er, at vit skulu broyta ella umstilla nakað. Hann er dugnaligur og altíð hollur í ráðum.

## Eftirlønargrunnurin 9 ár

Eftirlønargrunnurin er nú 9 ára gamal og er byrjaður so smátt at gjalda út. Ikki tað heilt stóra enn, men tó so, skjøtul er settur á.

Uppskot um stovnsetan av eftirlønargrunni varð samtykt á eykaaðalfundi hjá Havnar Handverkarafelag 29. november 1999. Skjótt varð borið at, tí longu 9. februar í 2000 varð hann stovnaður.

Havnar Handverkarafelag setti 5 milliónir í grunnin sum stovnsfæ.

Eg kann til stuttleika nevna, at í ár er nýggj tryggingarlóg sett í gildi í Føroyum.

Og um vit skuldu sett Eftirlønargrunnin á stovn í dag, hevði tað ikki kosta okkum 5 milliónir, sum galdandi var í 1999, men heilar 25 milliónir. Og tað kunnu vit so staðfesta her í dag, at tað hevði nokk verið torført, fyri ikki at siga ómøguligt at sett Eftirlønargrunnin á stovn í dag. Hetta gevur einum nakað at hugsa um.

Í hesum sambandi hava vit í nevndini lagt uppskot fyri fundin her í kvøld um broytingar í viðtøkunum í Eftirlønargrunninum, men alt hetta koma tit at hoyra meira um seinni.

Aktuarurin hjá okkum hevur gjørt uppskotið saman við sakføraranum hjá okkum eftir tilmæli frá Tryggingareftirlitinum, so tað skuldi borgað fyri dygd.

## Søguliga gongdin

Síðani vit byrjaðu í 2000 er nógv broytt, og ferð er komin á inngjøldini. Um eg ikki minnist heilt skeivt, so komu tað gott 800.000 krónur inn fyrsta árið.

Síðani hevur tað gingið skjótt framá, sum til dømis í 2007, tá komu 20 milliónir krónur í kassan, og í 2008 komu góðar 24 milliónir krónur inn. Jú, tað gongur skjótt framá.

Eg kann til samanberingar nevna, at pen-



sjónsgrunnurin hjá H.A. hevur góðar 110 milliónir í kassanum og okkara góðar 100 milliónir. Havast skal tá í huga, at grunnurin hjá H.A. varð settur á stovn í 1983 og okkara, sum áður sagt í 1999.

Í dag eru teir u.l. líka stórir, men vit ímynda okkum, at ferðin, sum grunnurin er voksin við, ikki verður so stór í komandi árum. Nú kreppan herjar runt allan knøttin.

## 10 ára starvstíð

Eitt annað mál, sum vit hava arbeitt við er at finna fram til, hvør ið eigur upp til 10 ára starvstíð.

Sum áður greitt frá setti Havnar Handverkarafelag 5 milliónir krónur í Eftirlønargrunnin sum stovnsfæ. Eftir kravi frá Tryggingareftirlitinum – hesin peningur skuldi jú seinni brúkast til limir í Havnar Handverkarafelag – hevur spurningurin verið, hvør og hvussu nógv, hvør einstakur skuldi fáa í part av teimum 5 milliónunum. Eg haldi nú, at vit – saman við Aktuarinum – hava gjørt eina so rættvísa skipan, sum til ber. Hon gongur í stuttum út uppá, at alt eftir, hvussu leingi, hvør einstakur hevur verið limur í Havnar Handverkarafelag, fáa tey tilsvarandi part í teimum 5 milliónunum.

Henda loysnin vísir seg nú eftir neyvari útrokning at kosta grunninum ikki tær væntaðu 5 milliónirnar, men gott og væl 8 milliónir. Hesar 8 milliónirnar eru tiknar av yvirskotinum av undanfarnum árum og vórðu avsettar í fjør, so nú er eisini hetta komið upp á pláss.

Hvussu verður so vorðið við teimum 5 milliónunum, ið Havnar Handverkarafelag setti í grunnin sum stovnsfæ, er eingin loysn funnin á enn.

Hetta nýtast vit tó ikki at taka støðu til fyrr enn ár 2015.

## Vit skulu vera stolt

So um eg skal siga tað sjálvur, so haldi eg, at vit bara kunnu vera stolt av okkum sjálvum, at vit veruliga eru komin so langt, sum vit eru, tí tað er nógv torførari hjá okkum, enn hjá millum annað politikarunum, tí teir kunnu við einum pennastroki fáa sær eina framúr góða eftirløn.

Og ikki nokk við tað, teir eru farnir – ja nú eri eg ikki heilt vísur í, hvussu nógv ár aftur í tíðina, men helst so langt, at teir allir allarhelst sita við hægstu eftirløn – tá teir fara úr Tinginum.

Eg kann her til samanberingar nevna, at tað tekur einum landsstýrismanni ella einum tingmanni bert 8 ár at uppnáa fulla eftirløn.

Tað svarar til, at teir fáa 60% av eini tænastumannaløn, hvat hon so enn er til ta tíð. Neyvan kann hon sammetast við okkara lønir

ella eftirlønir.

Um vit tó hóast alt sammeta til dømis okkum og politikkarar, so tekur tað okkum omanfyri 30 ár ella fyri at vera heilt neyvur, heili 37 ár at koma upp á fulla eftirløn, og tað sum vit harumframt skulu minnast til, er tað, at tað eru vit sjálvir, sum mugu gjalda okkara eftirløn, meðan politikkararnir líka sum arva sína eftirløn, so har er munur á monnum.

Og so til seinast – nú vit viðgera politikararnar – gerst tað alt meira sjónligt, og tað er tað, sum vit hava haft varhugan av og hava haft frammi næstan á øllum aðalfundunum líka síðan vit stovnaðu okkara egna eftirlønargrunn.

At politikarar úr øllum flokkum eru farnir at skeita, at eftirlønargrunnum og at Samhaldsfasta, og eru byrjaðir at koma við ymsum uppskotum. Hesi ganga øll út uppá, at arbeiðsmarknaðurin – t.v.s. vit og arbeiðsgevarin – skulu sjálvir taka okkum av okkara gomlu.

Tað er fyri so vítt ikki nakað galið við tí. Tað einasta, ið fellur mær fyri bróstið er, at øll skulu gjalda inn til Samhaldsfasta, alt eftir hvat tey hava forvunnið, og líka mikið um tey hava eina eftirløn ella aðra inntøku.

Men so kemur punktið, har eg líka sum ikki kann fylgja teimum. Tí tað eru politikarar í hesum landi, sum í fullum álvara meina, at tey, sum hava eina ella aðra eftirløn ella inntøku – líka mikið hvørja – skulu snøgt sagt ikki hava útgjald úr Samhaldsfasta.

Teir kalla tað solidaritet, tað vil við øðrum orðum siga, at tey, sum hava víst samfelagssinni og tikið ein part av síni løn og avsett hana til eftirløn, verða nú revsaði.

Vit skulu minnast til, at tað eru vit sjálvi, sum gjalda alla eftirlønina.

Eftirlønin er ein partur av tí, sum vit hava samráðst okkum til við arbeiðsgevarin. Arbeiðsgevarin flytur bara peningin okkara vegna. Tá eg nevni hetta, rennur mær í huga eitt summar. Veðrið var út av lagi vánaligt, og tað



regnaði illa. Jarðarráðið avgjørdi so, at gevast skuldi hoyggjstuðul til teir bøndur, ið høvdu ov lítið hoyggj.

Tá var tað sandoyingurin, sum hevði roynt at hoyggja hvørja løtu, sum til bar, spurdi: ”Góðin, hvør skal fáa hoyggjstuðul, tann, sum hevur roynt at hoyggja, ella tann, sum hevur liðið á Mallorca?”

## Stovnanin

Tá vit settu eftirlønargrunnin á stovn, varð tosað um, at vit máttu royna at koma upp á eini 15-17% áðrenn alt og long tíð var gingin, tí onnur feløg vóru longu farin í gongd fyri nógvum árum síðani, og vóru komin væl ávegis.

Tí var tað jú eitt framúr gott hugskot, at Havnar Handverkarafelag keypti einum stórum parti av sínum limum upp til 10 ára starvstíð. Tað vil sig; teir, sum høvdu verið limir í grunninum í stutta tíð, skuldi eisini fáa eina hampiliga eftirløn, tá teir komu til eftirlønaraldur.

Vit skulu minnast til, at teir, sum eru komnir upp í árini, hava ikki tann sama møguleikan at samla sær eina hampiliga eftirløn, sum teir yngru limirnir. Samstundis skal man minnast til, at tað eru teir tilkomnu limirnir, sum hava hildið sínar skyldur í felagnum og gjørt tað møguligt hjá felagnum at gjalda heilar 5 milliónir inn í eftirlønargrunnin, soleiðis at vit fingu

sett eftirlønargrunnin á stovn. Tøkk skulu teir hava fyri tað.

## Eru komin uppá 15%

Eftirlønin hjá okkum er 1. oktober í ár komin upp á 15% bæði hjá tí privata og hjá tí almenna. Har skal eg leggja afturat, at í sáttmálanum hjá tí privata gjalda limirnir 2% inn sjálvir. Tað má so verða eitt av okkara fremstu krøvum, tá vit aftur fara til samráðingar, at arbeiðsgevarin kemur at yvirtaka tey 2 prosentini, so at bæði hjá tí privata og hjá tí almenna, er prosentupphæddin 15. Og arbeiðsgevarin flytur alla upphæddina.

So er bert eftir at avgera, um vit skulu steðga við 15%, ella vit skulu fara upp á 17%. Sum nú sær út, eru tað fleiri av feløgunum, sum hava set markið har, men nú fáa vit at síggja.

## Rentan

Sum vit vita er rentan rættiliga lág enn, og tað sær út til, at hon fellur enn meir, so tað er trupult at fáa tað heilt stóra burtur úr tí innistandandi peninginum, um vit bert skulu líta á rentuna.

Hóast hetta hava vit gjørt avtalu um innlán við teir føroysku bankarnar upp á 3 mánaðir í senn, og tað hevur givið okkum nakað væl meira, enn bankarnir vanliga geva í rentum. Vit hava jú fitt av peningi at lána bankunum. Bankarnir mangla pening, og teir eru til reiðar at gjalda fyri tað. Ja, eg vil bart út siga, at tað, ið vit hava haft innistandandi, helst hevur givið okkum frægasta íkasti til Eftirlønargrunnin.



Onkur kundi kanska spurt, ja men hví hava vit so ikki haft alt standandi í bankunum til hæstu rentu?

Har skulu vit minnast til, at peningur, sum hevur verið innistandandi til hægstu rentu, ikki hevur verið 100% tryggur. Fór banki á húsagang, ið ikki hevur verið ókent – heldur ikki her hjá okkum – so hava einans 350.000 kr. ella 400.000 kr. verið tryggjað, restina kundu vit missa.

Men, sum vit vita, so hevur tann danski staturin nú tryggjað øll innlán 100 %, so nú hava vit ein stóran part av tí, sum eftirlønargrunnurin umsitur, standandi inni til hægstu rentu.

Eitt annað, sum kanska er positivt í hesum sambandi, er, at politikarar úr øllum flokkum bæði her á landi, í Danmark og í øðrum londum við, tosað heilt konkret um – at hava nógv betur eftirlit við bankum og fíggjarstovnum, so vit ikki koma út í slíka kreppu aftur.

## Ábyrgd

Eg fari her at heita á limirnar um sjálvi at ansa eftir, at tit fáa tað útgoldið, ið sáttmálin sigur. T.v.s. at arbeiðsgevarin flytur tað, sum hann eigur at flyta.

Her hugsi eg serliga um, at tit kanna eftir, um eftirlønin, sum er ein partur av lønini hjá tykkum, eisini verður flutt til felagið.

Sjálvandi kannar skrivstovufólkið eftir, at alt verður goldið, men har kann okkurt fara framvið uttan at tað verður fangað.

Hetta eru tykkara pengar, og so skulu vit minnast til, at hetta eftir hondini er ein stórur partur av lønini. Og harvið eisini limanna ábyrgd.

# Søgubrot um handverksvinnuna

**Leita vit nakað aftur í heimssøguna, so livdu fólk í stórum felagsskapum, sum ikki kunnu samanberast við okkara avmarkaðu nútíðarfelagsskapir. Tá var talan um breiðar felagsskapir, ið vóru førir fyri at útvega føði, klæði, amboð og annað, sum felagsskapurin hevði tørv á. Harumframt tilvirkaðu tey eisini vørur til býtishandli við aðrar felagsskapir.**

Í einum slíkum samfelag hevði handverksvinnan nógv størri týdning enn hon hevur í dag. Tá lá øll framleiðsluvinnan í handverksvinnuni, og í henni hevði einstaklingurin stóran týdning. Tey sum áttu serligt hegni og handalag til ávíst arbeiði gjørdust serfrøðingar á sínum øki og átóku sær ábyrgdina av tí. Tað var skilabetri enn, at øll skuldu taka sær av øllum. Tí vóru eisini serfrøðingar á mongum økjum, sum seinni gjørdust grundarlagi undir ymsum handverksgreinum, sum enn eru vanligar. Tá bygdu mong størv á menniskjalig evni og førleikar.

Umframt tey arbeiði, sum kravdu serfrøðingar vóru aðrar uppgávur, sum kravdu, at nógv fólk arbeiddu saman í felag. Tí hevði ein stórur felagsskapur eisini nógv størri týdning enn hann hevur í dag. Ognarrætturin til jørð hevði sjálvandi eisini týdning, men ikki amboðini, sum tá vóru fá og smá.

## Fyrstu broytingarnar

Tað er sjálvandi meira enn ein orsøk til, at framleiðsla og búsetingarmynstrið í Evropa broyttist so nógv seinast í 1700 talinum og fyrst í 1800 talinum. Tá tað  er sagt, so er vert at nevna, at hetta er um tað mundið, tá dampmaskinan er ment so mikið nógv, at hon verður grundarlagið undir einum nýggjum framleiðsluhátti, sum tekur seg upp í Evropa um hetta mundið.



*G. J. Holyoake (1817-1906), hevur skrivað um fyrstu tíðina hjá fakrørsluni.*

Hetta gjørdi m.a. at tey gomlu amboðini, sum t.d. rokkurin, fekk avbjóðingar, sum ongin hevði roknað við.

Tað verður sagt, at gamli rokkurin spann eina snældu við umleið 200 snúningum um minuttin, meðan maskinrokkurin spann fleiri 100 snældur í senn við 2.000 snúðningum um minuttin. Soleiðis kom eisini at vera við so mongum øðrum tólum og maskinum.

## Flutningur

Fyrst og harðast rakti henda kollveltingin vinnumøguleikarnar í Bretlandi. Ikki bara tí, at maskinurnar komu fyrst fram har. Tað hevði eisini stóran týdning, at bretar áttu stóran heimsmarknað hagar avlopsframleiðslan kundi verða seld. Nýggjar samgongur vóru gjørdar, og tað gjørdist eisini lættari at flyta tilfar og vørur til og frá verksmiðjunum. Her kunnu vit nevna, at fyrsta dampskipið varð bygt í 1807 og fyrsta jarnbreytin í 1825.

## Løntakarar

Nýggju maskinurnar kostaðu nógvan pening. Tær kostaðu so mikið nógv, at teir handverkarar, sum higartil høvdu framleiðsluna í hondum, ikki vóru mentir at keypa tær nýggju maskinurnar, og við teimum gomlu tólunum vóru teir ikki kappingarførir. Nú tók ein nýggj stætt seg fram, sum við peningamegi gjørdist ánari av nýggju framleiðsluamboðunum. Tey, ið áður høvdu verið fræls máttu nú geva seg upp til hesa nýggju stætt sum løntakarar.

## Ídnaðargerð og fólkaflyting

Henda kollveltingin, ið eisini verður nevnd ídnaðargerð, tók seg fyrst upp í Bretlandi í árunum 1770-1840, í Fraklandi 1825-1850, í Týsklandi 1850-1875. Í Føroyum verður vanliga sagt, at ídnaðargerðin tók seg upp í smáum seinast í 1800 talinum.

Umleggingin frá einstaklingavinnu til stórvirki var kollvelting bæði á ein og annan hátt. Ein partur av hesum var ein stór fólkaflyting av bygd til býir. Sum dømi kunnu vit vísa á Manchester í Bretlandi. Í 1719 búðu umleið 8.000 fólk í Manchester; í 1770 27.000 fólk og í 1841 umleið 350.000 fólk í Manchester. Siga vit, at henda stóra ídnaðargerðin í Bretlandi stóð við í 70 ár, so kunnu vit siga, at fólkatalið í hesum tíðarskeiði 12 faldaðist í Manchester. Í Føroyum síggja vit onga stórvegis fólkaflyting fyrr enn eini 30-40 ár eftir, at Einahandilin var tikin av; og tá kunnu vit nevna Tvøroyri sum dømi. Nakað seinni síggja vit, at fólkatalið í Klaksvík fór at vaksa óvanliga nógv av somu orsøk. Hesin fólkavøksturin í Klaksvík kann lutfalsliga samanberast við fólkavøksturin í Manchester.

## Kvinnur og børn

Tá fólkavøkstur og stórar fólkaflytingar taka seg upp koma íbúðarviðurskiftini undir stórt trýst. Tá gerast vanligu íbúðirnar í fyrsta lagi trongar, og í øðrum lagi sera vánaligar.

Hetta hendir samstundis sum grundarlagið verður tikið undan gomlu handverksvinnuni. Tá var fjøldin noydd at taka við størvum, sum





*James Watt: (1736-1819), ið menti dampmaskinuna í 1769.*

vóru illa lønt og í mongum føri eisini heilsuskaðilig.

Hjá stóru fjøldini var nú einans ein vánalig løn at liva av. Og í mong ár var eingin trygd móti sjúku, elli ella vinnuloysi. Vinnuloysið í býunum gjørdist stórt. Hetta gjørdi tað samstundis lættari hjá nýggju stættini at halda lønunum niðri. Fyri at fáa mat í munnin og tak yvir høvdi vóru nú eisini kvinnur og børn noydd í arbeiði undir vánaligum viðurskiftum og fyri ósømiliga lága løn.

## Trupulleikar

Undir hesum vánaligu umstøðum var tað, at lønarstættin leitaði saman at tingast um, hvat ið gerast kundi fyri at bøta teirra kor. Tey ásannaðu, at ein og ein megnaðu tey lítið ella einki, men í samstarvi og samanhaldi mátti onkur leið vera gongd. Mong uppskot vóru um gongdar leiðir, og nógv kundi verið sagt um teir ymsu møguleikarnar.

Onkur helt, at um vunnið varð á brennivíns-misbrúki, so var komið á góða leið. Tá kyknaði fráhaldsrørslan upp og mentist í mong ár. Men tí verri er hesin trupulleiki enn ikki loystur, og er - enn sum áður – ein stórur samfelagsligur trupulleiki.

## Atkvøðurættur

Onnur hildu, at besta leiðin var hin politiska; at vinna fjøldini atkvøðurætt og politiskt vald. Tann rørslan fekk góða undirtøku, og hevur eisini havt stóran týdning fyri føroyska løntakaran. Og mong eru tey, sum meta at henda rørslan hevur lagt grundarlagið undir okkara vælferðarsamfelag. Vit hoyra - enn sum áður – fólk siga, at lønarstættin átti at gjørt seg meira galdandi á politiska økinum, og, at støðan í heimsbúskapinum ikki hevði verið tann, sum hon er vorðin, um lønarstættin hevði gjørt seg meira galdandi í politiska í landslagnum.

## Samvinnurørslan

Ein onnur rørsla, sum eisini eigur at vera nevnd, er samvinnurørslan. Hon fekk alstóran týdning fyri eina stóra fjøld av fólki. Hon tók seg upp miðskeiðis í 1800 talinum, tá ið 28 fátækir handverkarar í Bretlandi tóku seg saman og løgdu eitt sindur av peningi til síðis hvørja viku. Tá ið hesir menn áttu tilsamans 28 £ opnaðu teir heimsins fyrstu keypssamtøku. Har var tað ikki peningurin, sum ráddi, men fólkið. Samvinnurørslan rakk eisini til Føroya, og hevur enn týdning fyri t.d. matvøruprísirnar í landinum.

## Søgufrøðingurin G. J. Holyoake

Bretski søgufrøðingurin, G. J. Holyoake (1817-1906), hevur skrivað um fyrstu tíðina hjá fakrørsluni. Hann skrivar m.a. soleiðis: “At vera ovasti í verkamannafylking var mangar ferðir verri enn at vera ovasti í eini hermannafylking. Tá talan er um hernarlig viðurskifti virða øll teir, sum ganga á odda. Í stættarstríðnum vóru tey, sum gingu á odda ofta vanvird; tað var heilt vanligt, at tey vóru tveitt út í arbeiðsloysi.”

Og G. J. Holyoake leggur afturat: “Lat tað eisini vera sagt, at tað er ikki annað enn ein syndarligur sannleiki, at størsti meinbogin mangan kann liggja har ein minst vantar. Í fakrørsluni var mangan talan um øvund og illvilja frá egnum partamonnum; hóast mong av teimum, sum gingu undan, komu at liva undir ósømiligum korum.

G. J. Holyoake skrivar eisini, at tey, sum umboðaðu sjónarmiðini hjá løntakarum mangan mistu sítt starv og fingu ikki somu møguleikar, sum øll onnur. Mong eru tey, sum komu í hesa støðu, og vóru noydd at flyta heimanífrá til aðrar býir ella langt burtur í onnur lond.


www.ns.fo
spar2
Alt gerst lættari...
Nú eisini galdandi
fyri Mac teldur!
Nýggj víðkað
útgáva av spar2
• Tú kanst gera uttanlandsflytingar
(SWIFT flytingar)
• Tú kanst keypa og selja virðisbrøv
• Tú kanst bíleggja kort
...og mangt annað!
GRAFIA
Norðoya Sparikassi
Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo


mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
SENDISTOVAN
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo

# Próvhandan á Tekniska skúla

**3. apríl 2009 var hátíðarhald á Tekniska skúla í sambandi við at 12 húsasmiðir fingu handað prógv.**



*Nýútbúnir sveinar, aftast frá vinstru: Amon Djurhuus Ellingsgaard Glyvrar, Bjartur Fríði Clementsen Tórshavn. Erik J. Neshamar Hoyvík, Gunnar H Haraldsen Tórshavn, H Bogi Hermansen Hósvík, Høgni Viderø Hoyvík, Jákup Hentze Apol Tórshavn. Fremra rað frá vinstru: Jan Fríði á Regni Toftir, Jens Pauli á Høgabóli Miðvágur, Jón Jacobsen Tórshavn, Martin Muller Poulsen Sumba, Petur Ísaksson Sørvágur.*








*Jan Fríði á Regni fekk gylta hamaran fyri sera gott avrik.*





# Tekniski Skúli í Tórshavn: Visión

## Skúlin er eitt stað, har næmingar og starvsfólk trívast:

- næmingar og starvsfólk eru við til at mynda skúlan
- skúlin lagar seg eftir tørvinum hjá føroyska samfelagnum
- lærarar og starvsfólk hava møguleika fyri javnan at verða dagførd innan sítt arbeiðsøkið
- skúlin er ein opin skúli, eisini aftaná vanliga skúlatíð
- skúlin gerst partur í mentanarumhvørvinum í Tórshavn
- skúlin er í framhaldandi menning
- skúlin er ein virkin og góður samstarvsfelagi
- skúlin lagar seg til altjóðagerðingina
- skúlin, umframt Skúlaheimið, eisini hevur eitt "kollegium"

## Endamálið hjá Tekniska Skúlanum í Tórshavn er:

1. at geva undirvísing í yrkisútbúgvingum eins og øðrum javnsettum útbúgvingum.
2. at menna og víðka útbúgvingarvirksemið.
3. at menna tann einstaka næmingin og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan.
4. at nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið ræður um fakligan førleika og almennan kunnleika.

5. at skipa fyri skeiðvirksemi.

## Virksemið hjá Tekniska Skúlanum í Tórshavn er í dag at geva frálæru til:

Handverkslærlingar
Støðisútbugving innan tøkni, S.I.T.
Framhaldandi útbúgvingar -"Yrkisakademi"
Skeiðvirksemi
Næmingar í fólkaskúlunum

## Virksemisgrundarlagið fyri lærlingaútbúgvingarnar er:

- maskinsmiðir
- plátu- og konstruktiónssmiðir
- stálskipasmiðir
- VVS- rørsmiðir
- bilsmiðir
- húsasmiðir
- bygningssnikkarar
- elektrikarar
- hárfríðkarar

## Virksemisgrundarlagið fyri tøkniligar útbúgvingar er:

- Støðisútbúgving innan tøkni, S.I.T.

## Virksemisgrundarlagið fyri "Yrkisakademi" útbúgvingar er:

- Framleiðslutøkningaútbúgvingin "FLT"
- Byggitøkningaútbúgvingin "BT"

Tað er altíð eitt gott hugskot at vitja heimasíðuna hjá Tekniska Skúla í Tórshavn: www.tst.fo



*Lærarar á timburdeildini:*
*Heðin Gásdal, David Isfeld, Benny Nielsen, Sigurd Sørensen, Andrias Jacobsen, Tummas Lauritsen og Johan Johannesen.*

# Broytingarnar í ALS-skipanini

Fyrst er at nevna, at útgjaldið hækkar upp til 80 % av mistu A-inntøkuni, til í mesta lagi 20.000 kr. mðn. Og útgjaldið verður frá fyrsta degi.

Stuðul til arbeiðsleys hækkar til 80 % av A-inntøkuni hjá viðkomandi fyrsta árið, fyri so at minka til 75 % restina av útgjaldsdøgunum.
Tó kann arbeiðsloysisstuðulin ongantíð verða hægri enn 20.000 kr. um mánaðin fyrsta árið og 18.750 kr. um mánaðin restina av útgjaldsdøgunum.

## Bíðidagar og Útgjaldstíðarskeiðið

At bíða eftir fyrsta útgjaldi er at leggja stein oman á byrðu hjá teimum, sum missa starvið. Tí eru bíðidagarnir tiknir burtur.

Útgjaldstíðarskeiðið verður yvir 2 ár stytt, soleiðis at rætturin til útgjald fellur burtur, tá arbeiðsleysur í undanfarna 3-ára skeiði, hevur fingið arbeiðsloysisstuðul í 648 dagar.

Frammanundan kundu fólk fáa útgjald í 798 útgjaldsdagar.

## Inngjaldsloft

Loft verður aftur sett á inngjaldið, so at trygg-ingartakarin ongantíð kann rinda meira enn 6.500 kr. um árið.

## Fiskavirkisskipanin

Útrokningargrundarlagið verður endurskoðað árliga.

Útrokingargrundarlagið fer tó ongantíð niður um fyrsta grundarlagið, ið verður ásett, tá ið viðkomandi kemur í skipanina.
Fólk í Fiskavirkisskipanini skulu vera tøk eftir vanligu reglunum.

## Fiskimenn

Ein skipan verður gjørd fyri fiskimenn, tá skip teirra verður lagt í sambandi við umvælingar drúgvari enn 30 dagar.

Útgoldið verður í mesta lagi í 60 útgjaldsdagar.

Fiskimennirnir skulu vera tøkir eftir vanligu reglunum.

Higartil hava fiskimenn verið í skipanini eftir vanligum reglum.

## Arbeiðsvenjingar

Langtíðararbeiðsleys kunnu hava trupult at koma út aftur á arbeiðsmarknaðin. Fyri at hjálpa hesum málbólki verður nú heimilað ALS at endurrinda arbeiðsgevarum fyri arbeiðsvenjingar.

Í tann mun, ALS fer at seta í verk starvsvenjingar, økjast útreiðslurnar í fyrstu syftu. Eydnast at fáa fleiri arbeiðsleys aftur í starv, minkar útgjaldið til arbeiðsleys og harvið útreiðslurnar hjá ALS.

## Fíggjarligar avleiðingar

Lógaruppskotið gevur ALS øktar útreiðslur alt eftir, hvussu stórt arbeiðsloysið er:

- Við einum arbeiðsloysi uppá 1,5% verður meirútgjaldið umleið 28 mió. kr.
- við einum arbeiðsloysi uppá 3,8% verður meirútgjaldið umleið 45 mió. kr.
- At útgjaldið verður hækkað frá 70% upp í 80%, fer í sjálvum sær at økja útreiðslurnar hjá ALS, hóast arbeiðsloysið ikki økist.

Skattainntøkurnar hjá landi og kommunum økjast nakað av hækkaða útgjaldinum.





**Lat heldur okkum gera tað...**

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

**...húsavarðaarbeiði**
**...alt snikkara- og timburarbeiði**
**...umvælingar**
**...sethúsabygging**

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

**Húsavarðartænastan**

**Ognað tær tín egna húsavørð**

# Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo



Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo




BYGMA
BALSLEV

# Byggitøkningur

## …í skapandi umhvørvi





**Einar Toftegaard, bygningssnikkari:**
Eitt val eg eri sera fegin um. Útbúgvingin er sera áhugaverd og fjølbreið. Fyrstu 3 semestrini arbeiddu vit í bólkum og nú, í síðsta semestri, arbeiða vit sjálvstøðugt við projektering. Farið at lesa víðari til byggifrøðing



**Óli Højgaard Olsen, húsasmiður:**
Mær dámar væl, havi lært nógv. Vit arbeiða nógv í bólkum. Vit nema við nógv økir innan bygging. Strævið – men gevandi. Ætli mær at lesa víðari til byggifrøðing



**Ada Kristina Petersen, studentur:**
Eg hevði ikki nakra vitan innan økið frammanundan, tó hevur gingið væl, øll í flokkinum hava ymsar sterkar síður og hjálpast. Samanhaldið er gott hóast aldursmunin - 23 til 52 ár. Kundi hugsað mær at lisið víðari til byggifrøðing

Útbúgvingin er ein 2 ára yrkisakademiútbúgving og fevnir, umframt almennar lærugreinir, um:

**Projektering**
- tekningar
- útrokningar
- byggimálsviðgerð

**Framleiðsla**
- projektstýring
- byggiframleiðsla

**Virki**
- virkisrakstur
- fyrisiting
- rættarviðurskifti

**Skráseting**
- uppmáting
- avseting
- metingar

### Upptøkutreytir:

**Miðnámsútbúgving**
- HH
- HT
- HIF
- HF
- Student
- SIT 2

**Handverksútbúgving**
- Húsasmiður
- Snikkari
- Múrari
- Elektrikari



TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

Meira fæst at vita við at ringja tlf. 73 80 50, ella við at vitja heimasíðu okkara www.tst.fo. Umsóknarfreistin er 1. juni 2009



Inventar
Tænastan

www.inventar.fo - Tel. 353800














Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo



FØROYABANKI

# Nýggj kundatænasta á telefon 330 330

Kundatænastan er títt beinleiðis samband við bankan, har vit veita tær tænastur skjótt, greitt og uttan umstilling.

Í Kundatænastuni fært tú altíð samband við bankafólk, ið er til reiðar at avgreiða tíni ørindi skjótt og greitt. Tær nýtist sostatt ikki at bíða eftir tínum ráðgeva. Um tú hevur ørindi, ið krevja ráðgeving, stilla vit teg sjálvandi um.

www.foroya.fo

SENDISTOVAN


demich
hiti | vatn | sanitet
Grønar orkuloysnir frá Demich
Nú er nýggja hitapumpan hjá Mitsubishi komin til Føroyar!
Við einum COP á 5,33 og einum hitaevni á heili 6,3 KW
• Serligt tøkni frá Mitsubishi electric
• Hitakapasitet á 1,5 upp til 6,3 KW
• COP á 5,33
• Sera still bert 20 dB. (stillasta á marknaðinum)
• Driftssikkur við lágan temperatur
• I-See sensor. Hesin leiðir hitan har tørvur er
• Reina og sunna luft við Plasma Duo Filtur
• Orkusparandi avrímingartøkni
• Nýggjan serligan kompressara
• Umhvørvisvinarligan kølimiðal
Serligt tøkni ger at pumpan gevur hita heilt niður til minus 15-25 gradir
20 dB(A)
Hitaorka (kw)
Uttandura hiti
Um dagin
Heitari luft verður send á kalda økið
Heitt økið
Um kvøldið
Heitari luft verður send á kalda økið
Kalt økið
Bert
15.900,-
v/ uppsetan
Demich P/F, Tórshavn
Postboks 378 - Stíðjagøta 2
Telefon +298 309 310
Fax + 298 309 311
Demich P/F, Vágur
Marknoyrarvegur 36
Telefon +298 373 535
Fax + 298 373 565
Demich P/F, Saltangará
Heiðavegur 80
Telefon +298 444 500
Fax + 298 445 501
demich@demich.fo • www.demich.fo
MITSUBISHI ELECTRIC
Changes for the Better


Tú ert handverkarin!
... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín
Vit kunnu bjóða
• spennandi arbeiðsuppgávur
• ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
• starvsfólkamenning
• trivnað
Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv
SENDISTOVAN
LM ELECTRIC
Hoyviksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo
LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice
Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20


Nær er kommunala brennistøðin opin?
Skriva rusk í einum sms
og send til 28 50 00
Tú fært svar beinanvegin!
Tórshavnar kommuna

Eik
Tryggari við fastari rentu
Fá tær realkredittlán frá okkum og slepp undan at hugsa um rentuhækkingar
www.eik.fo

# Ídnaðar- og garaguhurðar

**Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92**

**Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður**

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn




**VARTA**

THE BATTERY EXPERTS

## Battariir Til Øll Endamál

**Fartelefonir**

**Hoyri Apparatir**

**Ur og mangt annað**

**Eisini hava vit øll vanlig battariir**

**Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prisir**

**PÓLAR**

Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 63 47 - fax 31 63 67 fartal. 21 28 00

**elmek**

v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · fax 217700 · elmek@post.olivant.fo

**Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl**




Ring til okkara á 345 600 ella send okkum ein SMS til 1919 og skriva "ring" og vit ringja aftur til tín. Les meira á www.u-dagur.fo




Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari




Við Flags kanst tú flagsa á netinum við tíni fartelefon. Tú kanst lesa og skriva teldupost, lesa tíðindi, vera á Facebook og msn og gera alt tað, tú vanliga ger á netinum. Vit bjóða serligar Flags-pakkar, sum ger tað uppaftur lættari og bíligari at vera á.
**Bílegg Flagspakkar við at senda sms boð til 1441.**
**Fá meira at vita á www.ft.fo**

**SilvurFlags**
Mánaðargjald: 50 kr.
Íroknað 15 Mb download hvønn mánað
Kostnaður eftir 15 Mb: kr. 5,00/Mb
**Bílegg: Send "SilvurFlags" til 1441**

**GullFlags**
Mánaðargjald: 150 kr.
Íroknað 100 Mb download hvønn mánað
Kostnaður eftir 100 Mb: kr. 3,00/Mb
**Bílegg: Send "GullFlags" til 1441**

facebook bwin.com myspace.com a place for friends FLAGS

FØROYA TELE